*Løgmaður aftaná oljukunningarfund við tingmonnum:*

# Hetta var væleydnað

*Fundurin góður og uppmøtingin eisini. Uppskotið til oljulóggávu verður helst landsstýrinum í hendi í januar ella februar og umhugsað verður at skipa fyri einum seminari fyri tingmenn tá at viðgera alt hetta stóra mál, áðrenn tað verður lagt fyri tingið sigur løgmaður við Sosialin.*



*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini handar tingmonnum og landsstýrismonnum nýggja kortið yvir uppbýtið av føroyska økinum í teigar (blokkar). Mynd kalmar*

JAN MÜLLER

Seinasta hósdag vóru tingmenn, landsstýrismenn og embætisfólk í almennu landsumsitingini aftur á skúlabonki. Hesaferð at kunna seg við eina komandi oljuvinnu.

Tað var løgmaður, sum hevði kallað til fundin, nú røddir hava verið frammi í tinginum um, at politikararnir eiga at fáa meira at vita um, hvat hendir á oljuøkinum.

Á fundinum greiddu teir ymsu serfrøðingarnir hjá oljuumsiting og ráðleggingarnevnd frá arbeiðinum, og politikararnir fingu eina góða fatan av, hvussu langt hetta arbeiðið er komið.

Løgmaður sigur seg vera sera væl nøgdan við fundin, ikki minst hetta at uppmøtingin var so góð. Hann sigur, at er tørvur á einum sama slag fundi seinni, so verður hann eisini hildin.

Edmund Joensen upplýsir fyri Sosialinum, at uppskotið til eina oljulóg helst verður Tinganesi í hendi í januar ella februar.

Løgmaður sigur, at tað hevði verið eitt hugskot at skipa fyri einum seminari, tá øll lóggávan er klár, soleiðis at tingmenn kunnu vera væl inni í øllum spurningum, tá uppskotið verður lagt fyri tingið helst áðrenn 5. mars næsta ár.

Hesin dagurin er nevniliga seinasta freist at lata tinginum inn uppskot. Løgmaður vónar, at ætlanin fer at halda, men kemur okkurt óvart á, so verður neyðugt at fáa 17 tingmenn til at geva eykaloyvi at koma við uppskotinum eftir freistina.

Um niðurstøðuna frá fundinum sigur løgmaður, at arbeiðið gongur væl, hóast tað er nógv meira umfatandi enn upprunaliga hildið.

Vit spurdu Edmund Joensen, um hann hevur fingið nakra áheitan at vitja oljumálaráðharran í Noregi ella um hesin hevur fingið nakra innbjóðing úr Føroyum, nú hesir báðir spurningarnir vórðu reistir í samrøðum í Sosialinum herfyri.

Eg fari at bíða við at upplýsa nakað, men kann bert siga, at tað um diplomatiskar kanalir eru komin ávís signal úr Noregi. Spurningurin er so bara at formalisera tingini og gera av, nær norski oljumálaráðharrin kemur til Føroya og nær eg fari til Noregs.

Sosialurin skilur støðuna soleiðis, at løgmaður so gott sum stendur klárur til at fara til Noregs.

Herfyri segði táverandi norski oljumálaráðharrin Jens Stoltenberg, at kom ein innbjóðing úr Føroyum, so tók hann av. Síðani er tað hent, at Noreg hevur fingið eina nýggja stjórn. Jens Stoltenberg er vorðin fíggjarmálaráðharri, og nýggjur oljumálaráðharri er Grethe Fareme.



*Á fundinum vóru umboð fyri allar flokkar. F.v. Eyðun Viderø, Henrik Old, Martin Petersen og Kristian Magnussen. Mynd kalmar*



*Hesir báðir eru toppurin á oljupyramiduni. Edmund Joensen, løgmaður, sum umsitur undirgrund og olju í Tinganesi og Árni Olafsson, sum er formaður í Oljuráðleggingarnevndini og eisini leiðari í nevndini, sum samráðist um markið. Mynd kalmar*

*Jóannes Eidesgaard, form. javnaðarfl.*

# -Havi fult álit á oljuumsitingini

*Kunnandi fundurin fyri tingmonnum um oljuspurningin vísir, at vit hava tacklað spurningin professionelt og rætt og at tey frægastu fólkini vit eiga á økinum eru við í arbeiðinum sigur formaður javnaðarfloksins*

JAN MÜLLER

Ein av teimum tingmonnunum, sum var á kunnandi oljufundinum í Havn í seinastu viku var formaður javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur seg vera sera væl nøgdan við fundin og heldur, at bæði Oljuráðleggingarnevnd og Oljufyrisiting vóru væl fyrireikað til at geva eina grundleggjandi kunning um, hvat higartil er hent á økinum og hvørjar metingar, sum myndugleikarnir hava gjørt sær og koma at gera framyvir, áðrenn oljulóggávan kemur fyri tingið.

Eg eri sera glaður fyri at hava verið við til fundin, og eg haldi, at allir tingmenn vóru samdir um, at hetta var ein góður fundur.

Jóannes Eidesgaard heldur, at vit føroyingar hava taklað allan undirgrundar- og oljuspurningin bæði professionelt og rætt.

Vit hava sett eina Oljuráðleggingarnevnd og eina fyrisiting á stovn við tí frægasta fólkinum vit eiga á økinum, so eg havi stórt álit á teimum fólkunum. Men tað hevði verið gott um vit í tinginum fingu tá neyðugu tíðina at fyrireika okkum, tá oljulóggávan er klár og soleiðis at hetta ikki bara verður skundað ígjøgnum.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tingmenn hera ikki sørt av ótta fyri, at teir skulu fáa niðan í tingið eina veldugan pakka eins og støðan var við MVG lóggávuni og sum er so stórur og torskyldur, at eingin hevur ein livandi møguleika at duga tað uttanat. Tí er neyðugt at tingmenn fáa møguleika at kenna seg tryggar við alt hetta.